# Skateboard park í Havn

**Ungu havnafólkini, sum standa á skateboard, eru als ikki nøgd við umstøðurnar í høvuðsstaðnum. Býráðið arbeiðir við einari ætlan við einari skateboard park**

SKATEBOARD
*Heri á Rógvi*

Tað er og hevur í longri tíð verið ógvuliga væl umtókt millum ung í høvuðsstaðnum at standa á skateboard. Fyri ein góðan ordan skyld nýta kalla vit skateboard fyri skateboard.

Tórshavnar kommuna eigur eina serliga breyt til endamálið uppi í Gundadali – millum HB- og B36-húsið. Men hendan breyt er ikki nóg góð, eru brúkararnir samdir um.

Fleiri brúkarar, sum Sosialurin hevur tosað við, halda, at umstøðurnar eiga at betrast. Alternativið er so at nýta skateboard aðrstaðni í býnum, eitt nú í miðbýnum. Og tað er heldur ikki frítt, at tílík skateboard seta nøkur merki eftir seg.

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, sigur, at kommunan fleiri ferðir hevur fingið áheitanir og vitjanir frá ungum um at fáa umstøðurnar í lagi. Hann sigur seg kunna ásanna, at tað er ein stórur áhugi fyri hesum millum ung.

– Fólk standa á skateboard undir hvørjari trappu – eisini í miðbýnum. Eg veit, at tey fegin vilja umstøður aðrastaðni í býnum til skateboard, sigur Jan Christiansen.

Bæði foreldur og myndugleikar vísa eisini á, at tað ikki er heilt vandaleyst hjá ungu skateboardunum úti í ferðsluni, og tískil ynskja eisini nógv foreldur, at meiri skipaðar umstøður verða skaptar.

### Park

Og ein møguleiki at loysa trupulleikan er við einari skateboard park. Hendan góða park skal so hýsa fólki við áhuga fyri at standa á skateboard. Verandi breyt í Gundadali krevur nógvar ábøtur í heilum, og hon verður sum heild ikki hildin at vera nóg góð.

Ein tílík skateboard park krevur ikki so nógv – bert eitt sindur av plássi og asfalti. Vit eru farnir at hyggja okkum eftir einum hóskandi staði, sum ikki liggur alt ov avsíðis frá miðbýnum, sigur Jan Christiansen.

Sambært borgarstjóranum eru eisini nøkur hóskandi støð at finna, men hann vil ikki siga nakað nærri um, hvar hetta staðið kundi verið.

Men hóast kommunala umsitingin hevur eyguni opin fyri einari komandi skateboard park, so merkir hetta ikki, at vit kunnu vænta at síggja eina tílíka park í nærmastu framtíð. Málið er ikki politiskt viðgjørt, og enn er talan bert um tankar. Men sambært borgarstjóranum skal ikki so øgiliga nógv til, áðrenn ein nýggj park kann lata upp í høvuðsstaðnum.

### Rundkoyring

Verandi skateboardbreyt er sum sagt á økinum í Gundadali, har HB og B36 halda til. Umstøðurnar hjá bilum á hesum øki eru ikki tær bestu, og tosað hevur verið um at flutt skateboardbreytina til frama fyri einari rundkoyring ella líknandi, sum vil gera tað meira høgligt at ferðast millum húsini.

Men Jan Christiansen sigur seg einki kenna til eina tílíka ætlan. Og tískil verða umstøðurnar – í øllum førum fyribils – óbroyttar.



*Skateboardbreytin í Gundadali er ikki nóg góð. Eingin er rættiliga nøgdur við hana. Ein loysn kundi verið ein skateboard park, sum Tórshavnar kommuna í løtuni kannar møguleikarnar fyri at gera*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Lestrarstevna fyri øll

**Hóskvøldið verður lestrarstevna hildin í Vertshúsinum í Havn. Barnaansing verður eitt av evnunum**

LESTRARSTEVNA
*Heri á Rógvi*



*Anna Rein og Absalon Eysturoy, ráðslimir í MFS, skipa fyri lestrarstevnu hóskvøldið í Vertshúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hóskvøldið verður Vertshúsið í Havn karmur um eina lestarstevnu. Tað er MFS (Meginfelag føroyska studenta), sum skipar fyri stevnuni.

– Hetta er afturvendandi. Hesaferð hava vit valt at hava tað í meira hugnaligum umhvørvi, og tí hava vit valt at halda stevnuan í kjallarinum í nýggja Vertshúsinum, sigur Absalon Eysturoy, ráðslimu í MFS.

– Í høvuðsheitum fer stevnan at snúgva seg um, hvat føroyska samfelagið ger fyri at fáa føroyingar út um landoddarnar at lesa, og hvat somuleiðis verður gjørt fyri at fáa hesi heim aftur.

Eisini verður týdningurin av eini møguligara vegleiðing um størv og yrkisleiðir viðgjørdur. Henda vegleiðing snýr seg í stuttum um almenna vegleiðing og hjálp til nýútbúgvin, ið skulu søkja sítt fyrsta starv. Er tørvur á hesum, og hvussu kann ein tílík setast á stovn?, skriva fyriskipararnir í tíðindaskrivi.

Ætlanin hjá MFS, sum umboðar allar føroyingar lesandi á hægri lærustovni uttanlands, at síggja so nógv ung sum kanska ikki eru byrjaði at lesa.

– Tiltakið vendir sær til øll – lesandi og ikki lesandi. Tey eldru lesandi eru kanska serliga áhugaði í fleiri evnum, eitt nú barnaansing.

Ein trupulleiki, ið serstakliga rakar nýútbúna føroyingin, ið ætlar sær at flyta heim aftur til Føroya, er vantandi trygd fyri barnaansing, serliga Tórshavnar Kommunu. Hetta ger, at tey nýútbúnu aftra sær við at koma heim aftur eftir lokna útbúgving.

Við á stevnuni verða umboð fyri Fróðskaparsetrið, Altjóða Skrivstovuna, Stuðulsstovnin, Menningarstovuna, Tórshavnar Kommunu og Granskingarráðið. Eisini luttekur Høgni Hoydal, løgmálaráðharri og virkandi mentamálaráðharri.

Eivør Pálsdóttir fer at undirhalda við góðum tónleiki, og Rakel Helmsdal fer at lesa upp brot úr stuttsøgu.

Elin Súsanna Jacobsen frá Fróðskaparsetrinum tosar um møguleikar at lesa í Føroyum, og Terji á Lakjuni fer fyri Stuðulsstovnin at práta um stuðulsskipanina.

Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni fer at greiða frá arbeiði sínum við at hjálpa føroyingum út um Føroyar og Danmark at lesa.

Kjartan Kristiansen frá Menningarstovuni og Høgni Hoydal, løgmálaráðharri og virkandi mentamálaráðharri, tosa um, hvussu ein slík vegleiðing kann setast á stovn.

Viðvíkjandi barnaansing fara Kristina Háfoss, Høgni Hoydal og Heðin Mortensen at kjakast um barnaansingarmálið, og hvussu umstøðurnar kunnu betrast fyri lesandi við børnum.

### Gransking

Fyrireikararnir hava eisini sett gransking á skránna hóskvøldið.

Spurt verður, hvussu sær granskingarumhvørvið út í Føroyum, og hvør samskipan er á granskingøkinum?

– Hetta er eitt spennandi og órørt evni. Hetta vendir sær serliga til tey, sum eru ella eru við at vera liðug við eina hægri útbúgving, sigur Absalon.

Bárður A. Niclasen fer at práta um møguleikarnar fyri PHD-gransking í Føroyum.

## Klárir til ólavsøku

Fríðkanin av høvuðsstaðnum til tjóðarhátíðina gongur eftir ætlan, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri. Verkfallið herfyri seinkaði ætlaðu arbeiðunum hjá Tórshavnar kommunu, men sambært borgarstjóranum fer høvuðsstaðurin at vísa seg frá sínari góðu síðu á ólavsøku.

Kommunan ger vanligt viðlíkahald og fríðkar um býin í sambandi við ólavsøkuna. Sjálva fyriskipanina av ólavsøkuni hevur Tórshavnar ítróttarráð um hendi. Kommunan syrgir tó fyri sangheftum til felagssangin, og fólk frá kommuni sleppa eisini at rudda upp eftir ólavsøkugestunum.

-HR



**VIÐMERKINGAR**

# Sjónleikur ella veruleiki

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Hvør skuldi kent betri til sjónleik á politiska vígvøllinum enn júst tjóðveldisumboðini á løgtingi ?

Hetta mundi helst koma teim flestu til hugs, ið lósu viðmerking frá tjóðveldiskvinnuni Kristinu Háfoss til sambandsmannin Johan Dahl í vikuni.

Tjóðveldiskvinnan viðger m.a. tulkingarnar av Heimastýrislógini, og tað hevur hon sjálvandi loyvi til, men eg má rætta hana, tá hon tulkar sambandspolitikk og okkara Nýskipanaruppskot og samanber tað við sjónleik.

Tulking Kristinu H. er so púra burturvið, men trúgvasti stuðul Høgna Hoydal kann helst ikki gera annað.

Eitt hitt mest sjónska er, tá hon sigur, at Sambandsflokkurin vil fjala veruleikan.

Hevur nakar fjalt veruleikan, so er tað hennara egni flokkur, og skulu vit tosa um sjónleik, so kundi ein nevnt sjónleikin á gamla apoteki í vár, ið varð avdúkaður fyri almenninginum aftaná eina av óteljandi kreppunum í samgonguni.

Leikritið hevði sjálvur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum skrivað, og sjálvur hevði hann eisini leikstjórnað.

Nei, eg kann siga Kristinu Háfoss, at Sambandsflokkurin er tann politiski flokkur, ið best torir at siga sannleikan og hevur tikið støðu út frá tí sum er veruligt og realistiskt. Vit vilja ikki forkoma teim møguleikum vit hava og spæla við lagnu føroyinga.

### Nýskipanaruppskotið

Nýskipanaruppskotið er eitt samráðingarupplegg, ið byggir á stevnuskrá Sambandsfloksins. Vit vilja m.a. beina burtur møguleikarnar fyri at venda og snara tí, ið Heimastýrislógin nevnir ella ikki nevnir, og sum Tjóðvelsisflokkurin brúkar, nú skipanin hevur virkað í meira enn hálvthundrað ár. Tíðin er broytt hesi árini, og tí er besta loysnin at endurskoða skipanina, so hon er greið

Eisini eigur at nevnast, at tað sum Kristina Háfoss heldur lítið um, nevniliga at Sambandsflokkurin ikki vil yvirtaka rættarskipanina, er við beráddum huga orðað soleiðis í Nýskipanaruppskotinum, tí vit ikki vilja seta rættartrygdina í vanda, tá samlaða fólkatalið í Føroyum ikki er trygd fyri ógegni.

Men tað hevur ikki tann stóra týdningin fyrui Tjóðveldisflokkin, skilst á øllum brøgdum !

### Aktuelli spurningurin

Fyri at koma til aktuella spurningin í løtuni um fíggjarliga týdningin fyri danska limagjaldið í sambandi við NATO-limaskapin, so er hetta ein spurningur, sum Miðflokkurin tykist hava funnið sær fram fyri at rættvísgera sín fulla stuðul til samgonguna og skerda blokkstuðulin, nú fíggjarlógin fyri 2004 er á skránni. Hvussu verður við játtanini til heilsuverkið, tá landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur boðað frá uppaftur størri niðurskurði komandi ár ?

Tjóðveldisflokkurin ella formaðurin í uttanlandsnevndini vil hava fólkatingslimirnar at taka sær av tí, men her er talan um ein spurning fyri landsstýrið at taka sær av, um tað skal gerast. Danski forsætisráðharrin hevur svarað fólkatinginum tað sum verjumálaráðið sigur um málið, so har verður svarið ivaleyst hitt sama. Men annars stendur pástandur móti pástandi, og einastu persónarnir sum kunnu svara, hvat talan í veruleikanum var um, eru danskir ráðharrar, sum antin eru farnir frá ella ikki eru á lívi longur, og er ikki nakað seint hjá samgonguflokkum at koma við hasum spurninginum nú ?

Miðflokkurin hevur saman við Tjóðveldisflokkinum, Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum skrivað undir eitt samgonguskjal, har heildarveitingin verður fastfryst, t.v.s. einum niðurskurði.

Kanska kundi ein vent málinum við og sagt, at um so er, at pengar eru spardir, skuldi ein so ikki verið errin av, at vit hava verið við til at goldið okkara part ? ella er tað so, at Miðflokkurin onki vil hava við NATO at gera ?

**Til Sølu**

Vakur hvítur Passat 1,6i (sum nýggjur)
KM: 78.000
Prísuppskot: 130.000,- kr.

Áhugað ringið **319489**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Pioner**
**– hin vælumtókti plastbáturin**



- Stoyptur í einum
- Við dupultum skrokki
- Søkkur ikki
- Góðkendur av Norsk Veritas
- Fæst í nógvum modellum
- Vit hava Honda leysamotorar til bátarnar

Sosialurin 341800




veitst tú ikki tað?